


# Dorete Bloch • stjóri á Náttúrugripasavninum

Lýs teg sjálva við trimum orðum:
Arbeiðssom, impulsiv, engagerað

Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?
"Bíða nú!"

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
Nøsini!

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?
Sum oftast eri eg úti av húsinum umleið eitt korter aftaná, eg koyri beinini út um songjakantin.

Hvat stressar teg?
Tað, sum eg ikki fáa gjørt, tá tað skal gerast.

Hvat gleðir teg?
Tá tað gongur børnunum og ommubørnunum væl. Tá eg siti saman við vinum og arbeiðsfelagum, fegin yvir ein góðan døgurða, og lati hugflogið falda seg út.

Nær feldi tú seinast eitt tár?
Seinastu ferð, eg pilkaði leyk!

Nær smakkaði tú tær seinast á?
Í gjárkvøldið. Eg havi ein gest pt, og vit fingu okkum eitt glas av einum góðum whisky

Hvat var seinasta ynskið, sum tú fekst uppfylt?
Tað minnist eg ikki beint nú!

Hvar arbeiðir tú?
Eg havi sitið sum stjóri á Náttúrugripasavninum síðani 1995, og so havi eg eisini verið professari í lívfrøði á Fróðskaparsetur Føroya síðani 2000. Tá eg kom hendan vegin í 1974, var tað sum lektari á setrinum, men í 1980 flutti eg yvir á savnið, tí vit høvdu í fleiri ár ongi lesandi. Tað var ikki populert at lesa heima tá. Eg havi so alla tíðina undirvíst á setrinum.

Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær at arbeiða innan náttúruvísind?
At tey virkiliga brenna fyri at arbeiða við náttúruni, tí her er nógv at gera, men ikki nógv størv. Føroyar er enn eitt "jomfrueligt land" innan fyri nógv granskingarevni. Men tú skalt sjálv vera før fyri at finna evnini fram. Tí umhvørvið er so stak lítið, at tú næstan sjálv ert umhvørvið. Eisini tí vit sita so spjødd í dag. Í "gomlum døgum", tá eg kom til Føroyar fyri 31 árum síðani, var tað vísindaliga umhvørvið savnað á Debesartrøð. Túnatosið og tann stutta leiðin millum okkum gav so nógv ókeypis inputt, ið tú ikki fært í dag. Nú sita stovnarnir so spjaddir og hava oftast vánaligar umstøður at arbeiða undir. Vit á djóradeildini sita í tí reina slum í einum niðurløgdum sethúsum 2 km burtur frá restini av savninum.

Hvat er besta uppfinningin og hví?
Tápuligur spurningur,ført tú ikki nøkunlunda tað sama svarið hvørja ferð?

Hvat hevur tú í lummunum beint nú?
Felliknív og tummastokk

Hvat er títt besta heimaráð?
At brúka tilfar úr Føroyum, tá tú matger. Eg haldi, Føroyar er landið, ið "flýtur við mjólk og hunangi".

Hvør er stuttligast í Føroyum og hví?
Eg haldi meg ikki at hava møtt viðkomandi enn. Henda spurning og tann næsta haldi eg vera tápuligar!

Hvør er keðiligast í Føroyum og hví?
Hetta vil eg ikki úttala meg um, tað er synd í fólkinum!

Hvussu ofta speglar tú tær?
Nei, tað veit eg ikki ordiliga, men tað er helst ov sjáldan.

Hvussu ofta ert tú hjá frisør?
Alt ov sjáldan, tað er ikki mínum hári, frisørarnir liva av. Men einar 3-4 ferðir um árið, tá hárið dettur niður í eyguni. Við hvørt koma børnini heim frá frisørinum, ið hevur sagt teimum, at nú treingi eg til at klippast. Mær dámar sera væl at vera hjá frisør, so tað er ikki tað.

Hvør er tín løgnasta uppliving í starvinum sum savnsvørður?
Eg havi havt nógvar stuttligar upplivingar í míni tíð í Føroyum, ikki minst í grindini, men tað er ringt fyri meg at draga eina fram um hinar.